MÁLTEIGURIN

Úr Orðafari

Breið semja
Ofta hoyra vit sagt, at breið semja er um tað og tað málið. Her kann í staðin verða sagt, at málið fær góða undirtøku, fólk eru sum heild samd um ella á einum máli um tað ella tað o.s.fr.

LJÓÐSKRIFT
Tá ið vit umrøða mál og málsligar spurningar, er ofta ov lítið bert at siga, hvussu eitt orð verður stavað; tað hevur eisini týdning – eitt nú hjá loftmiðlunum – at tosa um framburðin av orðum, tí ofta er stórur munur millum talu og skrift. Til at vísa á framburðin hjá orðum verða tvær skrástrikur settar – ein høgrumegin og ein vinstrumegin orðið. Tá ið skrivað verður t.d. *fyrnast* /fidnast/, skal tað lesast soleiðis, at tað skráskrivaða orðið er stavsetingin, meðan tað seinna er framburðurin hjá orðinum.

Fyrnast og fyrning
Í sambandi við tað nógv umrødda bankamálið hevur nógv verið tosað um fyrning og fyrningarfreistir. Orðið *fyrningarfreist* er nýggjyrði og merkir tann dagur, tá ið krav í síðsta lagi skal verða framsett, um tað ikki skal missa rættargildi. Upprunin at orðinum er lýsingarorðið *fornur*; við i-umljóði fáa vit formar við y (*fyrna, fyrnast, fyrnd, fyrni, fyrning, fyrningarfreist* og *fyrningartíð*). Vit vita, at orðið *fornur* verður framborið /fodnur/, á sama hátt verða orðini *fyrnast* og *fyrning* framborðin sum /fidnast/ og /fidning/. Vit síggja, at rn regluliga verða til dn eins og í *barn, garn, tærnar* o.s.fr. Tað, sum ger, at vit stundum ivast í framburðinum er, at vit hava eitt annað orð, nevniliga *firnast*, sum verður framborið við rn. Men hesi bæði orðini *firnast* /firnast/ og *fyrnast* /fidnast/ hava einki við hvørt annað at gera.



KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: RADARSKERMUR

E	R	L	A	-	K	O	N	G	S	D	Ö	T	T	I	R
D	R	A	G	N	A	R		O	O		L	O	T	T	A
I		L	A		R	A	D	A	R	I		R		A	Ð
S	K	O	T	L	A	N	D		L	A	A	R		R	A
O	V	N	U	R			R	Ó	A	R		I	N		R
N	E	T			E	U		F	R	A	N	C	O		Ð
	N	A	R	T			N	W				Ð	E	R	T	U
A	N	I		O	S	K	A	R			T	Æ	Ð	L	A	I	R
O	K	N	I	R	N	A	R		R	E		L		N		
R	Y	E			P	E	S	E	T	A	S		I	N	N	I
T	N			E	I			N	A	S	K	I			U	R
A	I	D	S		Ð	Ð				K	A	L	I	U	M	
176	Ð				V	I		S	H	A	R	O	N			S
I		Þ	E	I	R	U	T	H					D	I		U
D	O	S		T			S	I		U	L	P	U	N	U	M
A	P	A		A	G	A	+	K	O	M	F	Ý	R	U	R	

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Vinnari: Shane Andreasen
Mylnugøta 7
700 Klaksvík

177

Loysunarorð: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.

Røktarleiðari

Røktarleiðarin í viðarlundunum fer í annað arbeiði, og starvið verður tí leyst at søkja.

Starvið fevnir um, undir leiðslu av landsskógarvørðinum, at fyriskipa og útinna dagliga, praktiska arbeiðið í viðarlundunum og øðrum frílendum, sum hoyra til stovnin.

Vit hugsa okkum starvið sett við fólki, ið hevur tøkniligt ella handverkligt ástøði, men annar viðkomandi yrkislunnleiki kann eisini vera av áhuga.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið hjá landsskógarvørðinum, tlf. 310922.

Umsóknir við avritum av møguligum prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. november 1998.

Skógrøkt landsins,
Hvítanesvegur 3, Postrúm 1174,
110 Tórshavn